Start varð bukað

Tað hevur gingið sera væl hjá Start, síðani liðið fekk nýggjan venjara, men í gjárkvøldið gekk rættiliga galið í útidystinum ímót Fredrikstad. Start tapti heili 4-0. Todi Jónsson spældi ikki við, tí hann hevur ein minni skaða at dragast við.

- Nú eru vit rættiliga komnir leysir av botninum, og vit kunnu líta upp eftir stigatalvuni. Harafturat hava vit eisini eina hálvfinalu í steypakappingini fyri framman, sigur Todi Jónsson um støðuna í Start í løtuni.

Start skal spæla ímóti júst Fredriksstad í hálvfinaluni í steypakappingini um ein mánað.



Dómarin svímaði

Dysturin millum Feyenoord og Heracle í bestu hollendsku deildini sunnudagin mátti stegðast í ein hálvan tíma, tá ið dómarin small um á vøllinum. Læknarnir hjá báðum feløgunum fóru í skundi á vøllin, og teir fingu dómaran, sum varð svímaður, á føtur aftur. Læknarnir tóku ongan kjans og sendu dómaran á sjúkrahús til kanningar. Fjórði dómarin fór tí á vøllin at døma, men dysturin lá stillur í ein hálvan tíma.

HB-Skála 1-1 (1-0):

Bert steypakappingin eftir

HB

Skála

Eftir javnleikin ímóti Skála sunnudagin, tykist FM-vónin hjá HB verða brostin

Mynd: Álvur Haraldsen

Einasta HB-vónin fyri gulli man nú vera tann, sum er knýtt at kappingini um Løgmanssteypið. Sunnudagin fingu teir dreymabyrjan, men megnaðu tó ikki at basa Skála í Gundadali

FÓTBÓLTUR

Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Dreymabyrjanina fekk HB, longu tá knappir sjey minuttir vóru spældir. Einar tvær ferðir hevði HB longu verið heilt nær Skálamálinum, tá Jákup á Borg sera hegnisliga legði teir á odda. Jákup var sjálvur við í uppspælinum, áðrenn hann á miðvøllinum slepti bóltinum og søkti inn í feltið. Høgi bólturin lá kanska ikki so væl, men eingin Skálamaður fór kortini eftir honum. Helst væntaðu bæði málverji og verja, at Jákup fyrst fór at temja bóltin, og tí stóðu teir púrasta negldir, tá Jákup við einum tekniskt truplum hálvfluktari legði bóltin í síðunetið til HB-leiðslu.

Mistu flog og hugflog

Eina løtu eftir hetta var tað framvegis HB, sum sat á tí mesta. Uppspælið gekk bæði eftir jørð út í borðini, og við beinleiðis longum sendingum upp móti sterka høvdinum hjá Rógva Jacobsen. Onkrar ferðir var veruligur vandi eisini á ferð, men Skála reið tó stormin av. Og spakuliga gjørdust teir eisini partur av dystinum.

Fyri steðgin gjørdust teir kanska ikki heilt vandamiklir, tó at teir høvdu hug at hótta. Men tað gekk ikki long tíð eftir steðgin, áðrenn javnvág aftur var í. Í royndunum at fáa meira bit og kreativitet inn í spælið, vórðu Bogi Gregersen og Alexendur Johansen sendir á vøllin fyri ávíkavist Debes Danielsen og Rúna Rasmussen.

Og tað gekk ikki long tíð, áðrenn Bogi hevði fingið javnvág í roknskapin. Sløsut HB-verjuspæl hevðið við sær, at Levi Hanssen brádliga slapp at baklinjuni, og so kundi Bogi sópa flata innleggið undir nettakið.

Tannleyst trýst

Tað, sum eftir var av dystinum, hevði Skála eina greiða spæliætlan. Teir bíðaðu tolnir eftir HB, sum nú mátti leypa á, og so lúrdu teir eftir kontramøguleikunum.

Hesir vóru eisini heilt nógvir í tali. Óteljandi ferðir gloymdi HB-miðvøllurin alt um at halda dýpið í spælinum, og við fýra miðvallarum høgt uppi á linju, var lag á manni hjá Skála at spáka sær móti brotsteiginum. Ikki minst, tí teir í Nenad Stankovic áttu í serflokki besta mannin á vøllinum. Men eins óteljandi nógvar ferðir vórðu gyltir møguleikar sløsaðir burtur. Seinasta og næst seinasta sendingin vóru antin ov óneyvar, ella varð skotið, tá menn heldur skuldi spælt, og tí var ógvuliga avmarkað, hvussu hóttur Bárður Johannesen í málinum var. Eina ferð hevði Bárður Danielsen tó bóltin í netinum, men tann royndin varð kolldømd fyri rangstøðu, og so gjørdist ikki meira.

HB megnaði í sín lut ikki at skapa tað heilt stóra. Móti dystarenda gjørdist tó talan um einstakar spentar støður, tá bóltar vórðu lossaðir inn í feltið, men nærri enn einum skoti væl upp um frá Jákupi komu teir tó ikki. Og sum vera man, so hjálpti tað teimum lítið, at dómarin stútt og støðugt var viðvirkandi til at taka ferðina av dystinum.

Fara eftir steypinum

Meira enn nakað, so staðfesti úrslitið, at HB nú er mest sum púrasta úti úr FM-stríðnum. Við sjey stigum upp til EB/Streym verður meira enn trupult at nerta teir, og tí verður helst fyrst og fremst hugsað um silvur og UEFA-Cup pláss nú. Ella sum heimasíðuverturin so beinrakið skrivaði eftir dystin: »Kanska eru leikarar okkara longu byrjaðir at hugsa um Løgmanssteypið?«

Løgdust afturá

At javnleikurin fyri HB mundi kennast sum eitt tap, er einki at siga til.

– Fyrstu 20 minuttirnar gekk hampuliga væl, men so detta vit í gomlu felluna. Vit detta ov langt aftur á vøllin, soleiðis at teir eisini sleppa við í dystin, segði Janus M. Joensen.

– Og eftir steðgin koma vit ongan tíð veruliga ígongd. Kanska byrja teir eisini at lesa okkum betri av, so teir vita, nær teir skulu trýsta. Í øllum førum megnaðu vit ikki at reisa okkum, og tað kostaði okkum dýrt.

-mørk

Bíðaðu bara

Hóast teir royndu at dyrgja eftir sigrinum, so tóktist lagið á Skálamanningini at vera so hampuliga gott eftir dystin. Í steðginum snúi tosið fyrst og fremst seg um, at nú skuldu teir byrja betri, enn teir gjørdu í fyrra hálvleiki. Og við málinum bara fýra minuttir seinni eydnaðist hetta til fulnar.

- So var tað jú upp til teir at skapa dystin. Tað eru ikki vit, sum stríðast fyri FM, og tí kundu vit væl liva við javnleikinum. Tí valdu vit bara at bíða, fyri síðani at dyrgja eftir kontramálinum, sum kundi avgera til okkara fyrimun. Tað riggaði sum so fínt, men vit fingu ikki næsta málið, so tað kunnu vit iðra okkum eitt sindur um, segði Pætur Dam Jacobsen eftir dystin.

-mørk